**Skúlastýrisfundur**

Dagfesting: 19.04.2016

Kl: 17:15–18:45

Til staðar: Jórun Simonsen, Andrea á Rípuni, Elspa Petersen, Tummas Marni Joensen, Súsanna Mortensen og Høgni Warberg

Heri Müller møtti ikki til fundin.

Skrivari: Høgni Warberg

Skrá:

1. Góðkenning av seinastu fundarfrásøgn

2. Fyrilestur við Mariu J. Niclassen Áræði, Áhaldni, Felagsskap

3. Trivnaðarætlan

4. Morgunvakt

5. Hugskot til kvøldskúla

6. Gongin ov køld ov heit ov hvít?

7. Ársaðalfundur Heim og skúli 2. apríl

8. Lærdómur er léttur at bera, sí skriv

9. Ymiskt

Att 1:

Fundarfrásøgnin varð góðkend og verður í næstum løgd út á heimasíðuna hjá skúlanum.

Att 2:

Jórun hevði tosað við Mariu Jørðdal Niclasen, og hon var sera jalig í samband við at hava fyrilestur til felagsforeldrafundin, ið verður mikukvøldið 16. november 2016. Avgjørt er, at Maria kemur at halda fyrilesturin, ið m.a. fer at snúgva seg um, hvat ið ávíkavist darvar ella stimbrar áræði og áhaldni í einum felagsskapi.

Att 3:

Trivnaðarætlan skúlans var til umrøðu, og avtalað varð, at vit arbeiða víðari við at menna trivnaðarætlanina til og á komandi skúlastýrisfundi. Dentur skal leggjast á, at uppsetingin skal verða greið, fangandi og móttakaravinalig. Til næsta fund skal trivnaðarætlanin hava verið viðgjørd í námsfrøðiliga ráðnum. Harumframt tosaðu vit um møguleikan fyri, at tað í skúlanum fer at verða skipa fyri nærningasamrøðum, har mann t.d. eisini kann nýta eitt einkult ítøkiligt (arbeiðs)skjal til samrøðurnar. Høgni fer at spyrja seg fyri, um hetta verður roynt í øðrum skúlum.

Att 4:

Vit tosaðu um ansingarskylduna av næmingunum um morgunin frá kl. 07:20 til kl. 07:50, tá tann fyrsti lærarin eigur at møta. Vit samdust um ta loysn, at húsavørðurin skal vera annaðhvørt í lærarastovuni ella í egnari skrivstovu í hesum tíðarskeiði, og at næmingarnir skulu kunnast um at so er, soleiðis at næmingarnir vita, hvar teir skulu fara, um eitthvørt er áfatt.

Att 5:
Avtalað varð, at allir borgarar í Kvívíkar kommunu skulu fáa møguleikan at fáa fram síni  ynskir um møgulig skeið til Kvøldskúlan komandi vetur. Til tess at fáa útbjóða fleiri skeið til Kvøldskúlan,, er tí ætlanin í juni at senda út skriv, har lýst verður við, at tey umvegis teldupost ella telefon kunnu fáa fram sín møguligu ynskir.

Att 6:
Tað gerst ofta ov heitt í høvuðsgongin í skúlanum í summarhálvuni, og tað gerst mangan ov kalt um veturin. Harafturat eru ljóðviðurskiftini í gongini ikki nóg góð, har óljóðsstigið mangan er ov høgt. Høgni fer í næstum at taka neyðug stig til, at bøtt fer at verða um hesi viðurskifti. Høgni fer m.a. at tosa við kommununa, høsavørð v.fl. Tummas Marni nevndi eina loysn t.d. í samband við kuldan um veturin, at ein dempari kann setast á hurðina beint innanfyri úthurðina, m.a. tí henda hurðin stendur ofta opin.

Att 7:
Jórun hevði verið til ársaðalfundin hjá felagnum Heim og skúli, ið var tann 2. apríl. Jórun tók samanum og greiddi frá ymsum áhugaverdum, ið hevði verið frammi á fundinum. Magni á Lakjuni, formaður fyri skúlastýrið í Eysturskúlanum, hevði lagt fram úrslit av kanning av internetnýtsluni hjá næmingum skúlans, sum skúlastýrið hevði fingið gjørt. Dagbjartur Debes, lærari á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum, hevði eisini havt áhugaverda framløgu við heitinum: Eftirmetingar í føroyska fólkaskúlanum. Dagbjartur var eisini í sínari framløgu komin inn á, hvørji viðurskifti eyðmerkja tann góða læraran, og hvussu týdningarmikil leikluturin hjá lærararunum er í samband við læruúrtøku næminganna.

Att 8: Vit umrøddu tiltakið “Lærdómur er lættur at bera”, ið verður í NLH 12. mai 2016. Tiltakið kostar 1.900 kr pr luttakara, og ongin limur í skúlastýrinum tyktist nóg áhugaður at fara til hetta tiltak.

Att 9:
Jórun bar boðini víðari frá Hera Müller um, at ein nevnd skal skipast, ið skal fyrireika 40 ára føðingardagin hjá skúlanum. Føðingardagurin skal haldast einaferð eftir summarfrítíðina. Frá kommununi kom ynski um, at tvey umboð frá skúlastýrinum skulu við í nevndina, ið skuldu verða Høgni Warberg, fyrstilærari og ein afturat. Á skúlastýrisfundinum var avgjørt, at eitt foreldraumboð skuldi so veljast í nevndina. Andrea varð vald í nevndina. Áðrenn vóru í nevndini Anni Isaksen og Petra Iversen, umboðandi kommununa.

Høgni segði, at hjartastartarin nú hongur í gongini í skúlanum tætt við svimji- og fimleikahøllina. Seinasti skeiðsdagurin í fyrstuhjálp verður fríggjadagin 29. apríl. Hjartastartarin í skúlanum er nú skrásettur og góðkendur á heimasíðuni www.hjartastartari.fo.
Høgni segði, at hann hevði tosað við Dánjal Petur, borgarstjóran, um hjartastartara, og at borgarstjórin hevði sagt, at ein annar hjartastartari var niðri á brannstøðini, at ein lykil hongur eitt sjónligt stað, soleiðis at øll sleppa framat tí hjartastartaranum.

Komandi skúlastýrisfundur varð avtalaður at vera týsdagin 31. mai kl. 17:15

Vegna skúlastýrið
Høgni Warberg, skrivari